**Nr. 4/2018**

**Bjørn Kalø**
**løgtingsmaður**

**Fyrispurningur eftir Tingskipanini § 52a**

**Fyrispurningur um menningarkvotur, settur landsstýrismanninum í fiskivinnumálum Høgna Hoydal, (at svara skrivliga eftir TS § 52a)**

1. Nær fekk landsstýrismaðurin tilmælið um menningarkvotur frá tilmælisnevndini?
2. Nær kann roknast við, at menningarkvoturnar verða tillutaðar?
3. Hvørji eru tilmælini frá nevndini býtt á feløg, fiskasløg, nøgd og økir?
4. Fer landsstýrismaðurin at fylgja tilmælinum neyvt?
5. Um nei, hvørjar verða so broytingarnar býtt á feløg, fiskasløg nøgd og økir?
6. Hvørjar eru grundgevingarnar fyri møguligu broytingunum í mun til tilmælið?
7. Eru nýggir aktørar í fiskivinnuni millum teirra, ið fara at fáa?

**Viðmerkingar:**
Í nýggju lógini um sjófeingi, er heimild givin landsstýrismanninum at luta út 8,5 % av fiskinum, ið kann fiskast av føroyingum, í menningarkvotum.

Undir viðgerðini av lógini í Løgtinginum greiddi landsstýrismaðurin frá, at hann í eini handavend, eftir tilmæli frá serfrøðingabólki, fór at tilluta menningarkvoturnar.

Men nú væl er liðið á árið, og tilmælið er latið frá serfrøðingabólki fyri tíð síðan, eru ongar menningarkvotur lætnar.

Mong hava tosað um politiska útlutan í sambandi við, at menningarkvoturnar skulu latast. Onnur um týdningin av, at aktørarnir í góðari tíð fáa kvoturnar, so fiskiskapur og framleiðsla kunnu leggjast til rættis og virðini gagnnýtast.

**Á Løgtingi, 7. august 2018**

Bjørn Kalsø